## Blív flogskipari

Tað finnast helst mong ung og tilkomin eisini, sum hava ein dreym um at gerast flogskipari. Komandi dagarnar er møguleiki fyri at fáa kunning um møguleikarnar. Mikukvøldið klokkan 19.30 verður kunningarfundur í Miðlahúsinum um flogskiparaútbúgving í Danmark. Fundurin verður endurtikin í hølunum hjá Atlantic Airways í Sørvági hóskvøldið klokkan 19.30. Tað finnast fleiri skúlar, sum útbúgva fólk til flogskipara. Ein teirra er Center Air í Roskilde, sum hevur drúgvar royndir innan hetta yrkið. Á fundunum í Havn og í Sørvági fer Anna Kjær Thorsøe, stjóri at greiða frá útbúgvingini hjá Center Air Pilot Academy. Har eru í løtuni tríggir føroyingar, sum nema sær flogskiparaútbúgving. Ein av næmingunum, Jan Lauritsen, verður við á fundunum og verður eisini høvi at seta honum spurningar.




# Javnaðarflokkurin vil tosa um ES



*Eini 35 fólk vóru møtt upp til kjakfund um ES í Miðlahúsinum fríggjakvøldið*

**Við fundi í Miðlahúsinum fríggjakvøldið vísir Javnaðarflokkurin, at hóast flokkurin enn er sannførdur um, at leiðin, sum er løgd viðvíkjandi millumlanda samstarvi, er rætt, so heldur flokkurin, at ES-kjak má á breddan**

ES
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri at birta upp undir kjak millum fólk um ES, skipaði Javnaðarflokkurin fyri almennum kjakfundi um ES fríggjakvøldið. Fyrst vóru tríggir fyrilestrarhildnir, og síðani var kjak um fyrimunir og vansar við ES, og um tað er nakað, ið støða skal takast til í dag.

Skal nøkur niðurstøða gerast av fundinum, so er hon, at politikarar halda, at fólk vita ov lítið um ES, at politiska økið hevur forsømt at tosa um ES fram til seinastu tvey árini, og tí má ferð fáast á hetta kjak, so mann er betri rustaður at taka ein støðu til ES, um ein støða nakrantíð skal takast.

Fyri at fáa eitt sindur av fjølbroytni á kvøldið vóru tríggir fyrilestrarhaldarar til staðar: Erik Boel, sum er formaður í donsku ES rørsluni, Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, og Sonja Jógvansdóttir, samskipari í Samtaki.

Millum spurningarnar eftir fyrilestrarnar var millum annað spurt, um Javnaðarflokkurin hevur broytt sína støðu mótvegis ES, men tað hevur flokkurin ikki, og at hann heldur, at ein millumloysn kann finnast millum ES og EFTA. Nakað, sum er juridiskt ógjørligt í verandi løtu.

Eisini er ein greið niðurstøða av fundinum, at tey, sum tóku orðið vóru samd um, at fer Ísland og møguliga eisini Noreg upp í ES við seravtalum um fiskivinnu, so eru fyritreytirnar hjá Føroyum munandi broyttar.

### Jóannes Eidesgaard: Pragmatikarin

- Tað ber til at velja EFTA uttan at avskriva ES og umvent. Politiskt ber til at uppfinna juridiskar veruleikar, og hóast tað í dag ikki ber til at gera bæði, so kann tað bera til, segði Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, og dróg heimastýrislógina fram sum eitt dømi um hetta.

Somuleiðis er hann av tí sannføring, at núverandi evropapolitikkur er fínur, men at mann eisini verður noyddur til at taka støðu til, hvat mann vil.

Eisini er hann sannførdur um, at ES er um at finna útav, at fiskivinnupolitikurin hjá samveldinum hevur sligið feil, og tí verður hann helst endurskoðaður, og hetta kann geva Føroyum fyrimunir.

### Sonja Jógvansdóttir: Verji ímóti lønardumping

Til at fáa ein heldur øðrvísi vinkul á ES, var Sonja Jógvansdóttir, samskipari hjá Samtaki, eisini við á fundinum.

Hon ber stóran ótta fyri, at arbeiðsmarknaðurin fær trupulleikar, um flytingin av fólki verður aktuell at verða púra frí, samstundis, sum hon øtast av dómum í ES, sum hava havt við sær, at rættindini hjá arbeiðstakarum er avmarkað munandi. Og at ES kann skapa møguleikar fyri, at arbeiðsmegi beinleiðis verður misnýtt.

Eisini metir hon, at tað fólksliga í ES manglar í ein stóran mun.

- Tað vóru fleiri, sum atkvøddu til Big Brother tað eina árið, enn tað vóru til ES val, staðfesti hon turt, fyri at vísa, hvussu lítlan áhuga fólk hava fyri ES.

Eisini metir hon, at ávirkanin hjá Føroyum í samband við ES verður nærum ongin, og at umsitingin skuldi vaksið ómetaliga nógv, um gjørt verður álvara av at fara upp í ES.

### Erik Boel: ES-apostul

Hinvegin heldur hann ikki, at ríkisrættarliga støðan er nøkur stór forðing, tí fer Føroyar upp í, so fær Keypmannahavn helst minni ávirkan á Føroyar.

Somuleiðis sær hann stórar fyrimunur við útbúgving, ferðavinnu og umhvørvi, um føroyingar gerast partur av ES.

Tó staðfestir hann eisini, at ES ikki so fegið vil taka lond inn í løtuni, men at Føroyar høvdu havt betri møguleika enn nógv onnur lond.



*Formaðurin í Javnaðarflokkinum er sannførdur um, at kjak má vera um ES, tí vit mugu taka veruliga støðu til, hvat vit vilja*



*Samskiparin í Samtaki er bangin fyri at fara Føroyar upp í ES, tí so kann arbeiðsmegi missa rættindi*



*Erik Boel, ið er heitur forsprákari fyri ES, metir ikki, at Føroyar eiga at hava so nógvan áhuga í ES, um tað ikki ber til at gera okkurt serligt við fiskivinnupolitikkin*